# Løgmansskrivstovan

**Til ummælis**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11.02.2019 |
| Mál nr.: | 0605-008/19 |
| Málsviðgjørt: | NF |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um at flyta persónsupplýsingar til útlond

Við heimild í § 16, stk. 2 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, verður ásett:

**§ 1.** Persónsupplýsingar kunnu uttan loyvi frá Dátueftirlitinum flytast til hesi lond:

1) Andorra
2) Argentina
3) Belgia
4) Bulgaria
5) Danmark
6) Estland
7) Eysturríki
8) Finnland
9) Frankaríki
10) Gibraltar
11) Grikkaland
12) Guernsey
13) Isle of Man
14) Italia
15) Írland
16) Ísland
17) Ísrael
18) Jersey
19) Lettland
20) Liktinstein
21) Litava
22) Luksemborg
23) Kanada
24) Kekkia
25) Kroatia
26) Kýpros
27) Malta
28) Niðurlond
29) Noreg
30) Ný Sæland
31) Pólland
32) Portugal
33) Rumenia
34) Slovakia
35) Slovenia
36) Spania
37) Sameinda Kongsríkið (Ongland, Wales, Skotland og Norðurírland)
38) Svøríki
39) Sveis
40) Týskland

41) Ungarn
42) Uruguai

*Stk. 2.* Hóast loyvi ikki krevst frá Dátueftirlitinum at flyta persónsupplýsingar til hesi lond, skal flutningurin fráboðast Dátueftirlitinum.
*Stk. 3.* Er talan um at flyta viðkvæmar persónsupplýsingar av landinum, krevst loyvi til tess frá Dátueftirlitinum sbrt. § 17 í løgtingslógini. Hetta er galdandi, hóast viðgerðarloyvi at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar er fingið frá Dátueftirlitinum sbrt. § 35, stk. 1 og 2 í løgtingslógini.
*Stk. 4.* Er talan um viðkvæmar persónsupplýsingar fevndar av kunngerð um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, krevst onki loyvi til at flyta persónsupplýsingarnar av landinum.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.

Navn á stjórnarráði, dagfesting

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir